# Samferðslumálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 14. februar. 2019 |
| Mál nr.: | S6800-026/18 |
| Málsviðgjørt: | Arø/nb |
| Eftirkannað: | 31. januar 2019 |

**Løgtingsmál nr. 98/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)** (Leingjan av rættinum til barsilspening við tveimum vikum, harav onnur er markað til pápan)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)**
(Leingjan av rættinum til barsilspening við tveimum vikum, harav onnur er markað til pápan)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan (Barsilslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 166 frá 20. desember 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1, stk. 2, 2. pkt. verður "4 vikur" broytt til: "5 vikur".

**2.** Í § 1, stk. 4 verður "4 vikur" broytt til: "5 vikur".

**3.** Í § 2, stk. 3, 2. pkt. verður "4 vikur" broytt til: "5 vikur" og "52-56 vikurnar" broytt til: "56 vikurnar".

**4.** Í § 9, stk. 1, 2. pkt. verður "42 vikur" broytt til: "43 vikur" og "46 vikurnar" broytt til: "52 vikurnar".

**5.** Í § 9, stk. 2, 1. pkt. verður "28 vikur" broytt til: "29 vikur".

**6.** Í § 9, stk. 3 verður "4 vikur" broytt til: "5 vikur" og "46 vikurnar" broytt til: "52 vikurnar".

**7.** § 9, stk. 4, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Hóast ásetingarnar í stk. 2 og 3 hevur faðirin rætt til barsilspening í upp til 48 vikur innan fyri 52 vikur eftir barnsburð, um mamman doyr, ella læknaváttan staðfestir, at mamman vegna álvarsliga sjúku ikki er før fyri at taka sær av barninum."

**8.** Í § 9, stk. 6 og 7 verður "28 vikunum" broytt til: "29 vikunum".

**9.** Í § 10, stk. 1 verður "50 vikur" broytt til: "52 vikur".

**10.** Í § 10, stk. 3, 2. pkt. verður “4 vikur” broytt til: “5 vikur” og “46-50 vikurnar” broytt til: “56 vikurnar”.

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juni 2019.

*Stk. 2.* Henda løgtingslóg er galdandi fyri foreldur at børnum, fødd ella ættleidd sama dag, sum henda løgtingslóg kemur í gildi, ella seinni, og fyri tey foreldur, sum eru í skipanini, og sum fáa útgjald eftir §§ 9 ella 10. Løgtingslógin er eisini galdandi fyri tey foreldur, hvørs útgjaldstíðarskeið eftir §§ 9 ella 10 er endað, men har seinasta útgjaldið úr Barsilsskipanini ikki er útgoldið.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Samgongan hevur sett sær fyri at leingja rættin til barsilspening til eitt ár.[1] Landsstýrið hevur í hesum valskeiðinum longt rættin til barsilspening úr 38 vikum til 46 vikur eftir barnsburð. Við hesum lógaruppskotinum verður rætturin til barsilspening longdur við tveimum vikum afturat til 48 vikur, og málið upp á 52 vikur nærkast.

Samgongan vil, at javnstøðupolitikkur skal raðfestast høgt, og hevur sett sær fyri at styrkja javnstøðu millum kynini.[2] Sambært átaki 17 í virkisætlanini, Javnstøðupolitikkur,– tí tað loysir seg, hjá Almannamálaráðnum eigur Barsilsskipanin í størri mun at eggja pápum at taka barsilsfarloyvi. Tí verður onnur vikan, sum nú verður løgd afturat rættinum til barsilspening, oyramerkt til pápan. Kanningar úr okkara grannalondum vísa, at tey londini, sum marka ávísar vikur til pápar, hava best úrslit í mun til, at pápar fara í barsilsfarloyvi. Samanborið við páparnar í grannalondunum eru føroysku páparnir teir, ið taka minst lut í rættinum til barsilsfarloyvi. Í Danmark taka páparnir 10% av barsilsfarloyvinum, í Finnlandi 11%, í Norra 21%, í Svøríki 27% og í Íslandi 30%.[3] Føroysku páparnir taka 8% av barsilsfarloyvinum.[4]

Hjá ættleiðingarforeldrum verður rætturin til barsilspening somuleiðis longdur við tveimum vikum, úr 50 vikum í 52 vikur.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi løgtingslóg um barsilsskipan gevur foreldrum rætt til barsils*farloyvi* í 56 vikur tilsamans eftir barnsburð. 14 vikur eru markaðar til mammuna, og 4 vikur eru markaðar til pápan; 38 vikur kunnu tey deila sínámillum. 4 vikur av barsilsfarloyvinum kunnu foreldrini halda samstundis. Barsilsfarloyvið skal vera hildið innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð.

Foreldrini hava rætt til barsils*pening* í 46 vikur tilsamans. Harav hevur mamman rætt til 14 vikur, og pápin hevur rætt til 4 vikur; 28 vikur kunnu tey deila sínámillum. Foreldrini kunnu fáa barsilspening í 4 vikur samstundis. Rætturin til barsilspening er galdandi innan fyrstu 46 vikurnar eftir barnsburð.

Í dag hava ættleiðingarforeldur rætt til barsilsfarloyvi í 56 vikur eftir barnsburð og rætt til barsilspening í 50 vikur eftir barnsburð.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at leingja rættin til barsilspening eftir barnsburð við tveimum vikum, úr 46 vikum í 48 vikur og fyri ættleiðingarforeldur úr 50 vikum í 52 vikur. Onnur vikan av barsilspeninginum verður markað til pápan.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður rætturin til barsilspening úr Barsilsskipanini longdur við tveimum vikum. Pápin fær rættin til ta einu vikuna, meðan foreldrini sjálvi gera av, hvør teirra nýtir rættin til hina vikuna. Pápin fær sostatt rætt til barsilsfarloyvi og barsilspening í 5 vikur, sum mamman ikki kann brúka. Onki verður tó tikið frá mammuni, sum varðveitir sín rætt til 14

[1] https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/6803/fylgiskjal-mal-at-fremja-kvf.pdf
[2] https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/6803/fylgiskjal-mal-at-fremja-kvf.pdf
[3] Norðurlendska Ráðharraráðið, *Nordisk Statestik 2017*
[4] Upplýst frá Barsilsskipanini.

vikur við barsilsfarloyvi og barsilspeningi. Harafturat verður “felagskvotan” longd við eini viku soleiðis, at foreldrini nú fáa 29 vikur við barsilspeningi, sum tey sjálvi gera av, hvør teirra nýtir.

Rætturin til barsilspening verður longdur úr 46 vikum í 48 vikur eftir barnsburð. Inngjaldið til Barsilsskipanina verður ikki hækkað; tað verður verandi 0,71%.

Ættleiðingarforeldur fáa við lógaruppskotinum rætt til barsilspening í 52 vikur eftir barnsburð, í mun til 50 vikur áðrenn.

**1.5. Ummæli**

Hesir partar fingu lógaruppskotið til ummælis tann 15. november 2018:

Akademikarafelagið, Almannamálaráðið, Almannaverkið, Barsilsskipanin, Bioanalytikarafelagið, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Ergoterapeutfelagið, Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum, Farmakonomfelagið Føroyadeild, Felag Tænastumanna Landsins, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Felagið Maskinmeistaralærarar, Fiskimálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Fysioterapeutfelag Føroya, Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverkarafelag, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Føroya Reiðarafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Tekniska Lærarafelag, Føroysk Miðlafólk, Grafiska Yrkisfelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Heilsu- og innlendismálaráðið, Heilsuhjálparafelag Føroya, Heilsurøktarafelagið, HK stat Føroya Deild, Hjálparlæknaráð Føroya, Javnstøðunevndin, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Kommunulæknafelag Føroya, Kost- og Føðslufelagið, Landsfelag Handverkaranna, Ljósmøðrafelag Føroya, Løgmansskrivstovan, Maskinmeistarafelagið, Meginfelag Útróðrarmanna, Mentamálaráðið, Musikklærarafelag Føroya, Prestafelag Føroya, S&K Felagið, Samtak, Serlæknafelag Føroya, Starvsmannafelagið, TAKS, Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Yngri Læknar, Yrkisfelag teirra, ið starvast í tryggingar-, fíggjar-, KT o.tíl fyritøkum, Yrkisfelagið Miðnám.

Ummælisfreistin var 13. desember 2018.

Samferðslumálaráðið fekk svar frá Almannamálaráðnum, Almannaverkinum, Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya, Fakfelagssamstarvinum, Fiskimálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Javnstøðunevndini, Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, Heilsuhjálparafelag Føroya, Heilsurøktarafelagnum, Heilsutrygd, Heilsu- og innlendismálaráðnum, Maskinmeistarafelagnum, Mentamálaráðnum, TAKS og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

Flestu teirra høvdu ikki viðmerkingar til uppskotið.

Ein viðmerking var, at lógin eigur at fáa gildi afturvirkandi frá 1. januar 2019 soleiðis, at lógin eisini verður galdandi fyri foreldur at fyrsta føroyingi í 2019. Til hetta er at siga, at lógaruppskotið er galdandi fyri øll foreldur, sum hava rætt til útgjald frá Barsilsskipanini, tá ið lógin kemur í gildi; t.e., at markið er foreldur at børnum, fødd 48 vikur, áðrenn lógaruppskotið kemur í gildi.

Almannaverkið veitir stuðul vegna barnsburð eftir forsorgarlógini til persónar, ið ikki hava rætt til útgjald úr Barsilsskipanini, har stuðul verður veittur í sama vikutal, sum barsilslógin leggur

upp til. Leingjan av rættinum til barsilspening fer sostatt væntandi at hava øktar útreiðslur við sær fyri Almannaverkið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur enn sum áður, at Barsilsskipanin eigur at verða tikin upp til eina heildarviðgerð, har hugt verður eftir, um tørvur er á at gera skipanina meiri liðiliga, ístaðin fyri áhaldandi at gera smærri broytingar við stuttum millumbilum. Hetta eigur at verða gjørt í samstarvi millum landsstýrið og partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Undrast verður á, at til ber at koma við áhaldandi broytingum, sum hava øktar útreiðslur við sær, uttan at hetta krevur eykað inngjald. Felagið tekur ikki undir við at gera enn eina broyting í barsilslógini.

*Viðmerkingar um javnstøðu millum kvinnur og menn*
Almannamálaráðið, Javnstøðunevndin, Búðskapar- og løgfrøðingafelag Føroya og Føroya Arbeiðsgevarafelag hava viðmerkingar um javnstøðuspurningin. Mælt verður til, at báðar vikurnar, sum verða lagdar afturat barnsburðarfarloyvinum, verða markaðar til pápan. Grundgevingin er, at tað vísir seg, at mammurnar brúka allar vikurnar við barsilspeningi, sum ikki eru markaðar til pápan. Tess størri felagskvotan verður, tess longri tíðarskeið eru kvinnur burtur frá arbeiðsmarknaðinum, og hetta hevur neiliga ávirkan á javnstøðuna millum kynini, eisini langt inn í framtíðina, m.a. tá ið tað snýr seg um løn, starvsaldur, karrierumøguleikar og pensjónsuppsparing hjá føroyskum kvinnum. Kanning vísir, at fyri hvønn mánað, sum pápin er í barnsburðarfarloyvi, hækkar framtíðar lønin hjá mammuni við nærum 7%. Víst verður eisini á, at tað gagnar familjuni á ymskan hátt, tá ið pápar fara í barnsburðarfarloyvi. Í virkisætlanini til javnstøðupolitikkin hjá landsstýrismanninum í almannamálum verður dentur lagdur á, at Barsilsskipanin eigur at vera meira smidlig, og at skipanin í størri mun eigur at eggja pápum til at taka barsilsfarloyvi. Lønargjógvin millum kynini verður enn størri. Børn hava rætt til bæði síni foreldur, og barsilstíðin er eitt upplagt høvi at geva foreldrum og børnum møguleika fyri eini góðari byrjan.

Samferðslumálaráðið ásannar, at tað er ikki rætt at grundgeva býtið av hesum báðum eyka barsilsvikunum við javnstøðu millum kvinnur og menn. Tó er valt at halda fast um, at onnur vikan verður markað til pápan, og hin fer á felagskvotuna, sum foreldrini sjálvi gera av at býta. Málið er at leingja barsilin til eitt ár eftir barnsburð, og við hesum uppskotinum verður komið nærri hesum máli. Við at marka aðra vikuna til pápan, kann væntast, at pápar fara í barsilsfarloyvi eina viku longur enn áður. Vónandi kann tað vera við til at ávirka hugburðin hjá foreldrum soleiðis, at tað gerst meira vanligt, at pápar taka lut í barsilsfarloyvinum.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**
Kostnaðurin av at leingja rættin til barsilspening við tveimum vikum verður fyri Barsilsskipanina mettur at verða umleið 4 mió. kr. í øktum barsilsútgjaldi fyri eitt fíggjarár.

Mett verður, at Barsilsskipanin samanlagt fer at hava eitt avlop upp á 4,76 mió. kr. í ár (2018). Lógarbundnu útreiðslurnar verða 126,16 mió. kr. Fyrisitingin kostar 2,2 mió. kr., og inntøkurnar verða 133,12 mió. kr.

Nú rætturin til barsilspening verður longdur við tveimum vikum frá 1. juni 2019, vísa dagførdar framrokningar, at Barsilsskipanin fer at hava eitt lítið avlop í 2019, 2020 og í 2021.

Í 2019 verða lógarbundnu útreiðslurnar mettar til at verða 133,17 mió. kr. Fyrisitingin fer at kosta 2,2 mió. kr., og inntøkurnar verða mettar til 137,12 mió. kr. Samanlagt eitt avlop upp á 1,75 mió. kr.

Roknað verður við einum avlopi upp á umleið 1,0 mió. kr. í 2020 og 500 tús. kr. í 2021.

Ogn Barsilsgrunsins verður mett til at blíva 17,0 mió. kr. ultimo 2018. Sostatt er grunnurin førur fyri at fíggja eitt møguligt hall í eina tíð, um fíggjarliga gongdin ikki verður so góð, sum roknað var við frammanundan.

Ætlaða broytingin krevur, at broytingar skulu gerast í elektronisku skipanunum, sum Barsilsskipanin brúkar. Tað er torført at meta um, hvat ið teknisku umleggingarnar og umsitingarlig viðgerð annars fara at kosta. Elektron sigur seg ikki kunna geva eina meting av, hvat ið broytingin fer at kosta, tí at TAKS, sum umsitur Barsilsskipanina, skal skifta til ein nýggjan platform, sum Elektron ikki hevur roynt at gera broytingar í áður. Tær seinastu ferðirnar, tá ið barsilslógin er broytt, hevur Elektron mett, at kostnaðurin fór at vera millum 150.000 kr. og 262.000 kr.

Barsilsgrunnurin ber kostnaðin av at leingja rættin til barsilspening og av elektronisku broytingunum.

Almannaverkið veitir stuðul vegna barnsburð eftir forsorgarlógini til persónar, ið ikki hava rætt til útgjald úr Barsilsskipanini. Stuðul verður veittur í sama vikutal, sum løgtingslóg um barsilsskipan leggur upp til. Almannaverkið hevur upplýst, at leingjan av rættinum til barsilspening sostatt væntandi fer at hava øktar útreiðslur við sær fyri Almannaverkið. Í fjør, tá ið rætturin til barsilspening varð longdur við tveimum vikum, væntaði Almannaverkið, at tað fór at kosta teimum uml. 230.000 kr. um árið.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur nakað av umsitingarligum avleiðingum við sær hjá TAKS, sum umsitur Barsilsskipanina.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Rætturin hjá løntakarum til barsilspening eftir barnsburð verður longdur við tveimum vikum. Tað er sostatt sannlíkt, at løntakarar gera brúk av hesum rættinum og verða burtur frá sínum arbeiði í longri tíð í sambandi við barsilsfarloyvi.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur avleiðingar fyri løntakarar, ið fara í barsilsfarloyvi. Rætturin til barsilspening verður longdur við tveimum vikum, harav onnur vikan er oyramerkt til pápan. Hyggur man eftir støðuni í grannalondunum, fer hetta væntandi at hava við sær, at fleiri pápar fara at vera longur í barsilsfarloyvi, tí at kanningar vísa, at jú størri partur av barsilsfarloyvinum er markaður til pápan, jú størri part av barsilsfarloyvinum brúka páparnir. Hetta fremur javnstøðu millum kynini og hevur týdning fyri tilknýtið til barnið. Sí annars punkt 1.1. omanfyri.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd er viðkomandi fyri barsilslógina. Tó hevur hetta lógaruppskotið onga broyting í mun til sambandið millum barsilslógina og norðurlendska sáttmálan um almannatrygd.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið er í samsvari við meginreglurnar í Evropeiska mannarættindasáttmálanum og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur markaforðingar við sær, eins og uppskotið ikki verður mett at tarna flytføri hjá einstaka borgaranum.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki skyldur á fólk, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin ella annan myndugleika.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar, enn tilskilað omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Nr. 1**
Ásett verður, at pápar hava rætt til barsilsfarloyvi í 5 vikur innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð í mun til 4 vikur, sum teir hava eftir núverandi lóg. Víst verður til almennu viðmerkingarnar, har tað stendur um ágóðarnar av, at pápar fáa longur barsilsfarloyvi.

**Nr. 2**
Ásetingin hevur við sær, at foreldur kunnu hava barsilsfarloyvi samstundis í 5 vikur innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð í mun til 4 vikur, sum tey hava rætt til eftir núverandi lóg. Hetta gevur foreldrunum eitt vet størri frælsi til at leggja sær barsilsfarloyvið til rættis.

**Nr. 3**
Her verður ásetingin um, at ættleiðingarforeldur kunnu hava barsilsfarloyvi samstundis í 4 vikur, eftir at tey hava fingið barnið, broytt til, at tey kunnu hava barsilsfarloyvi samstundis í 5 vikur. Hesar skulu haldast innan fyri fyrstu 56 vikurnar eftir, at foreldrini hava fingið barnið. Broytingin samsvarar við broyting nr. 2 omanfyri.

**Nr. 4**
Í § 9, stk. 1, 2. pkt. fær mamman rætt til barsilspening í 43 vikur eftir barnsburð í staðin fyri 42, sum tað er eftir núverandi lóg. Rætturin til barsilspening skal vera nýttur innan 52 vikur eftir barnsburð í mun til 46 vikur eftir núverandi lóg. Við hesi broytingini kunnu foreldrini sjálvi gera av, nær í barsilsfarloyvistíðarskeiðnum tey velja at nýta rættin til barsilspening. Hetta kann gera tað eitt vet smidligari at leggja barsilsfarloyvið til rættis.

**Nr. 5**
Í staðin fyri, at mamman nýtir rættin allar 43 vikurnar við barsilspeningi, kunnu foreldrini gera av, at pápin kann nýta upp til 29 vikur við barsilspeningi. “Felagskvotan” verður harvið longd við eini viku, úr 28 vikum til 29 vikur.

**Nr. 6**
Rætturin hjá pápum til barsilspening verður longdur við eini viku, úr 4 vikum til 5 vikur. Hetta samsvarar við broyting nr. 1 omanfyri, har rætturin hjá pápum til barsilsfarloyvi eisini verður longdur úr 4 vikum í 5 vikur. Víst verður til almennu viðmerkingarnar, har tað stendur um ágóðarnar av, at pápar fáa longur barsilsfarloyvi. Rætturin til barsilspening skal vera nýttur innan 52 vikur eftir barnsburð í mun til 46 vikur eftir núverandi lóg. Hetta kann gera tað eitt vet smidligari at leggja barsilsfarloyvið til rættis.

**Nr. 7**
Broytingin av § 9, stk. 4, 1. pkt. er ein fylgibroyting av, at rætturin til barsilspening verður longdur. Við hesi broytingini hevur pápin eisini rætt til allar 48 vikurnar við barsilspeningi, sum mamman og pápin tilsamans hava rætt til, um mamman doyr, ella læknaváttan staðfestir, at mamman vegna álvarsliga sjúku ikki er før fyri at taka sær av barninum. Rætturin til barsilspening skal vera nýttur innan fyri 52 vikur eftir barnsburð.

**Nr. 8**
Hetta er ein fylgibroyting av broyting nr. 5 omanfyri, sum leingir “felagskvotuna” av barsilspeningi úr 28 vikum í 29 vikur.

**Nr. 9**
Rætturin hjá ættleiðingarforeldrum til barsilspening, eftir at tey hava fingið barnið, verður longdur úr 50 vikum í 52 vikur.

**Nr. 10**
Hendan broytingin samsvarar við broyting nr. 3 omanfyri. Ættleiðingarforeldur kunnu hereftir fáa barsilspening samstundis í 5 vikur í mun til 4 vikur eftir núverandi lóg. Rætturin til barsilspening skal vera nýttur innan fyrstu 56 vikurnar eftir, at foreldrini hava fingið barnið, í mun til innan 46-50 vikurnar eftir núverandi lóg. Við hesi broytingini kunnu foreldrini sjálvi gera av, nær tey nýta rættin til barsilspening í øllum tíðarskeiðinum, har tey hava rætt til barsilsfarloyvi, sbrt. § 2, stk. 1. Hetta ger tað eitt vet smidligari at leggja barsilsfarloyvið til rættis.

**Til § 2**
Í stk. 1 er ásett, at lógin kemur í gildi 1. juni 2019.

Stk. 2 er skiftisregla, sum ásetir, hvør ið er fevndur av lógarbroytingini. Tey, ið hava rætt til barsilsfarloyvi við barsilspeningi samsvarandi hesum lógaruppskoti, eru foreldur at børnum, sum eru fødd ella ættleidd sama dag, sum lógin kemur í gildi, ella seinni, og tey foreldur, sum eru í skipanini, og fáa útgjald sambært §§ 9 ella 10. At enda er ásett, at foreldur, hvørs útgjaldstíðarskeið eftir §§ 9 ella 10 er endað, men har seinasta útgjaldið frá Barsilsskipanini ikki er útgoldið, eisini eru fevnd av lógarbroytingini. Hesin seinasti parturin av skiftisregluni, um at foreldur, hvørs seinasta útgjald úr Barsilsskipanini ikki er útgoldið, eisini eru fevnd av lógarbroytingini, varð settur í lógarbroytingina frá mai 2014 (løgtingsmál nr. 126/2013) av Vinnunevndini, og hevur verið nýttur fleiri ferðir síðani, tá ið barsilslógin er blivin broytt.

Samferðslumálaráðið, 14. februar 2019

**Heðin Mortensen**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarskriv frá Búðskapar- og løgfrøðingafelag Føroya
Fylgiskjal 3: Hoyringarskriv frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 4: Hoyringarskriv frá Javnstøðunevndini
Fylgiskjal 5: Hoyringarskriv frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 6: Hoyringarskriv frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 7: Hoyringarskriv frá Fakfelagssamstarvinum
Fylgiskjal 8: Hoyringarskriv frá Fiskimálaráðnum
Fylgiskjal 9: Hoyringarskriv frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 10: Hoyringarskriv frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum
Fylgiskjal 11: Hoyringarskriv frá Heilsuhjálparafelag Føroya
Fylgiskjal 12: Hoyringarskriv frá Heilsurøktarafelagnum
Fylgiskjal 13: Hoyringarskriv frá Heilsutrygd
Fylgiskjal 14: Hoyringarskriv frá Heilsu- og innlendismálaráðnum
Fylgiskjal 15: Hoyringarskriv frá Maskinmeistarafelagnum
Fylgiskjal 16: Hoyringarskriv frá Mentamálaráðnum
Fylgiskjal 17: Hoyringarskriv frá TAKS
Fylgiskjal 18: Hoyringarskriv frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum